# Noreg og Ísland skulu gjalda fyri marknaðaratgongd til tann víðkaða ES-marknaðin

**ES hevur lagt fram harðar treytir fyri at gera ein nýggjan sáttmála við tey trý EFTA-londini, Noreg, Ísland og Liktinstein. Samráðingarnar byrjaðu í gjár.**

ES-EFTA

*Árni Joensen:*



Tað vóru umboð fyri tveir ójavnar partar, sum hittust í Bruxelles fyrrapartin í gjár. Øðrumegin borðið sótu umboð fyri tey trý EFTA-londini, Noreg, Ísland og Liktinstein, og teirra 4,8 milliónir fólk. Hinumegin sótu umboðini fyri tey 15 ES-londini og teirra næstan 500 milliónir fólk.

Partarnir eru ikki bara ójavnir, men standa eisini ógvuliga langt frá hvør øðrum.

ES hevur undir teimum fyrireikandi samráðingunum kravt, at tey trý EFTA-londini skulu gjalda millum 2,8 og 3,6 milliardir krónur um árið aftur fyri at víðka verandi EBS-sáttmála. Hjá Noregi verður hetta serliga dýrt, tí heldur ES fast um kravið, skulu norðmenn rinda 95 prosent av pengunum ella millum 2,7 og 3,4 milliardir krónur um árið.

## Atgongd til kvoturnar

Men higartil hevur norska stjórnin verið ógvuliga støðuføst í samráðingunum og hevur blankt sýtt fyri at ganga kravinum úr Bruxelles á møti. Stjórnin í Oslo sigur, at hon kann ganga við til at gjalda ES 300 milliónir krónur árliga, sum svarar til tað, sum Noreg í dag rindar ES og teimum tíggju londunum, sum hava fingið tilboð um limaskap í samveldinum.

Afturímóti hevur norska samráðingarnevndin kravt, at Noreg skal fáa so lagaliga atgongd fyri sínum fiskavørum á tí víðkaða ES-marknaðinum, sum til ber. Norðmenn vísa á verandi sáttmála við ES og á, at landið frammanundan hevur havt fríhandilssáttmála við við tey tíggju umsøkjaralondini.

Hetta norska kravið hevur ES sagt seg vera sinnað at góðtaka, men tó við teirri treyt, at áhugað í ES skulu fáa rætt til at keypa seg inn í norska fiskiflotan og á tann hátt fáa atgongd til norskar kvotur. Hetta kravið er ikki einans vent ímóti ES, men eisini Íslandi, og bæði Oslo og Reykjavík hava gjørt greitt, at hesa treytina kunnu londini ikki góðtaka.

Sostatt er semja millum norðmenn og íslendingar á hesum økinum, men tær fyrireikandi samráðingarnar hava víst, at tey trý EFTA-londini eru minni enn so samd í øllum spurningum, nú tær veruligu samráðingarnar eru byrjaðar.

## Atgongd kostar

Sviin Percy Westerlund stendur á odda fyri samráðingarnevndini hjá ES, heldur tað ikki vera órímiligt av ES at krevja atgongd til norsku og íslendsku fiskivinnuna.

– Vilja EFTA-londini hava lagaligari atgongd fyri sínum fiskavørum á tí víðkaða ES-marknaðinum, mugu vit afturfyri fáa rætt til frælsi innan kapital og íløgur í fiskiflotan hjá londunum, sigur hann. Percy Westerlund vísir á, at nú ES verður víðkað í næstum, er tað ikki annað enn rímiligt, at tey trý londini uttanfyri rinda so mikið meiri fyri marknaðaratgongdina, tí nú fer ES-marknaðurin at umfata umleið 75 milliónir fleiri fólk.

Norðmenn hava higartil sýtt fyri at gjalda meiri enn 300 milliónir krónur árliga, og svenski samráðingarleiðarin sigur, at halda norðmenn fast um tað, verða samráðingarnar truplar. Hann leggur afturat, at tann kostnaðurin, sum ES hevur ásett, svarar til tað, sum EFTA-londini skuldu goldið, vóru tey limir í samveldinum.

– Harafturat kemur, at ES hevur ikki ráð at lata sínar ríku vinir fáa fría atgongd til sín marknað, uttan at teir rinda tað, sum teir hava ráð at rinda, sigur Percy Westerberg, sum eisini vil vera við, at EFTA-londini hava longu fyrimunir í samskiftinum við ES, sum nógv onnur lond ikki hava.

## Greiða støðu

Norski samráðingarleiðarin, Bjørn T. Grydeland, er ikki samdur við svenska starvsbróðurinum hinumegin borðið í Bruxelles.

– Okkara áskoðan er, at tað eru tey tíggju umsøkjaralondini, sum vilja gerast partur av EBS-samstarvinum. Tað er einki, sum sigur, at vit skulu rinda meiri, fyri at tey kunnu fáa sítt ynski uppfylt, serstakliga tá hugsað verður um, at okkara marknaðaratgongd verður verri, nú ES verður víðkað, tí vit hava longu fríhandilsavtalu við tey tíggju umsøkjaralondini, sigur Bjørn T. Grydeland.

Noreg rindar sum er 165 milliónir krónur um árið í tann sosiala útjavningargrunnin hjá ES, og norska stjórnin hevur sagt vera til reiðar at økja hetta gjaldið, treytað av, at ein nøktandi loysn verður funnin á spurninginum um marknaðaratgongd hjá norsku fiskavørunum.

Men svarið hinumegin borðið hevur verið líka greitt:

– Eg haldi ikki, at EFTA-londini hava nakað at kæra seg um. Tey hava biðið um, at landbúnaðar- og fiskivinnupolitikkurin verður hildin uttan fyri EBS-samstarvið, og tað hava vit góðtikið, og tey hava tí fleiri fyrimunir, sum ES-londini ikki hava, sigur Percy Westerlund.

# Fiskimenninir skulu hava minni inntøku

**Tað heldur í hvussu er norski stórreiðarin og ríkmaðurin Kjell Inge Røkke, sum vil hava hýrurnar umborð á sínum skipum lækkaðar.**

INNTØKUVIÐURSKIFTI

*Árni Joensen:*

Kjell Inge Røkke og felag hansara, Norway Seafoods, halda, at menninir, sum sigla við trolarum teirra, hava ov stóra inntøku, og tí roynir felagið nú at fáa fiskimenninar at góðtaka sersáttmálar uttan um tann vanliga sáttmálan.

Orsøkin til royndirnar hjá reiðarínum er ein nýggj skipan við eindarkvotum. Sambært sáttmálanum skal manningin hava ávísan prosentpart av landaðu veiðini, og tá tann nýggja skipanin ber í sær, at kvotur hjá trolarum verða lagdar saman, fáa fiskimenninir munandi størri úrtøku.

Hesum er Norway Seafoods ímóti og roynir tí at noyða sínar manningar at góðtaka sersáttmálar, sum skulu geva minni úrtøku.

Mánadagin var fundur millum leiðsluna í Norway Seafoods og umboð fyri manningarfeløgini, og har kom fram, at manningarfeløgini góðtaka ikki ætlanina hjá reiðarínum. Felagið hjá yvirmonnunum hevur gjørt greitt, at tað hevur ein sáttmála, sum tað ikki ætlar sær at víkja frá.




# Søkt verður eftir deildarstjóra
## til Marknaðardeildina á Føroya Tele

Fjarskifti og kunningartøkni mennast alsamt skjótari um allan heim, og tann týdningur, sum hetta hevur fyri búskapin í einstøku londunum gerst alsamt størri. Hugtøkini "nýggjur búskapur", vøkstur og framburður verða beinleiðis tengd at kunningartøkniliga støðinum í landinum. Týdningurin av nýggju búskaparligu menningini er ikki minni í Føroyum enn aðrastaðni, heldur hinvegin.

Føroya Tele hevur sum aðalendamál, at føroyingar skulu kunna gagnnýta menningina á fjarskiftisøkinum á best møguligan hátt. Hetta setir stór krøv til Føroya Tele, sum er ein av størstu fyritøkum í Føroyum.

## Deildarstjóri til Marknaðardeildina

"Tú mást sjálv/-ur vera tann broytingin, sum tú ynskir at síggja í heiminum"

Mahatma Gandhi

Fyri Marknaðarstjóra okkara, sum søkir sær nýggjar avbjóðingar, verður søkt eftir nýggjum deildarstjóra til hetta áhugaverda økið. Umframt at vera stjóri á Marknaðardeildini myndar Marknaðarstjórin leiðslubólkin á Føroya Tele saman við stjóranum, Fíggjarstjóranum og Tekniska stjóranum og stjóranum fyri Virkismenning.

**Marknaðardeildin, sum telir uml. 80 fólk, er skipað við hesum undirdeildum og stápum:**

- Teledepilin í Havn - herundir Telebúð, Avrokning, Kundatænasta og Kundaskráseting
- Tænastumiðstøðin
- Meginumvælingin
- Teleforlagið
- Vinnudeildin
- Montørdeildin
- Tænastumenning og marknaðarløring
- Harumframt vísa 6 økisleiðarar til Marknaðardeildina í øllum marknaðarmálum.

Marknaðardeildin er andlit Føroya Tele út til viðskiftafólkið. Uppgávurnar eru í høvuðsheitum at menna tænastuútboðið og tænastustigið, at menna og fyriskipa marknaðarætlanir, marknaðarkanningar, lýsingar- og sølutiltøk umframt mannagongdir, góðskustýring og samstarvsavtalur við aðrar fyritøkur.

**Ábyrgdin hjá deildarstjóranum verður, umframt ábyrgdina av omanfyristandandi, at:**

- menna andlit Føroya Tele úteftir og økja um kappingarførið
- síggja til, at starvsfólkið hevur neyðugu førleikarnar til at røkja uppgávurnar
- saman við leiðslubólkinum og starvsfólki annars at leggja marknaðarstrategiir fyri Føroya Tele og marknaðarætlanir fyri virkisøkini á Føroya Tele
- rakstar-, íløgu- og tíðarætlanir halda

Útbúgving: Ástøðilig útbúgving frá hægri lærustovni sum t.d. cand. merc., cand. oecon, verkfrøðingur ella líknandi.

**Umráðandi fyri Føroya Tele er, at tann, ið sett/-ur verður:**

- hevur góð samstarvsevni og áhuga fyri trivnaði starvsfólksins
- hevur leiðsluroyndir frá líknandi størvum innan tað almenna ella innan privata vinnulívið
- tekur stundum stórar avbjóðingar til sín
- dugir at geva frá sær uppgávur og eggja øðrum til at taka við avbjóðingum
- hevur hollan kunnleika til KT
- hevur royndir í at arbeiða í altjóða umhvørvi
- dugir enskt og skandinaviskt á samráðingarstigi
- trívist í einum umhvørvi, sum broytist frá degi til dags
- hevur áræði og eru ágrýtin

Løn sambært avtalu

Meira fæst at vita um starvið frá Andrasi Róin, stjóra, á tlf. 303030

Umsóknir við avritum av viðmælum og prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 13. januar 2003 kl. 12.00.

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn



Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýri eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Fjarskiftisøkið er í stórari menning og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!